# So kemur høllin í Kollafirði

**Farið verður nú undir arbeiðið at byggja ítróttarhøllina í Kollafirði**

Eftir at togast hevur verið um givin lyfti av ymsum slag, byggi- og fíggingarhátti, er nú loksins líkt til, at kollfirðingar fara at fáa sína ítróttarhøll.

Vagnur Johannesen, formaður í Hallarstuðlanevndini, sum kemur at standa fyri byggingini av høllini, sigur at enn eru allir smálutir ikki endaliga komnir upp á pláss, men at tey vóna, at tað fer at bera til at fara í holt við arbeiðið heilt skjótt.

– Vit jú, hvar høllin skal standa, og sjálvt økið er jú at kalla klárt. Har er grovplanerað, og hæddin er eisini tann rætta, men enn eru onkrir snøklar eftir. Eitt nú er jú sera umráðandi, at hetta verður neyvt í samsvari við tær ætlanir, sum eru um útbyggingina av skúlanum í Kollafirði, soleiðis at tað ikki verður nakað, sum skal gerast afturumaftur, sigur Vagnur.



*Nú eru loksins útlit fyri, at kollfirðingar fáa ítróttarhøllina. Og um heilt stutta tíð verður eftir ætlan farið í holt við sokkulsarbeiðið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vagnur er annars ein av teimum, sum í mong ár hevur tikið síni tøk á besta hondbóltsliðnum hjá KÍF, og hann er ikki í iva um, at nýggja høllin kemur at fáa ein veldugan týdning fyri alla ítróttina í bygdini.

– Tað sigur seg sjálvt. Nú hava vit verið flytifuglar ígjøgnum somikið nógv ár, og tað verður ongan tíð ein nøktandi loysn. Bara í minni tíð hava vit vant á Skála, so Vestmanna, og so bæði Skála og Vestmanna fram til vit nú eru í Hoyvíkarhøllini. Og sama skilið er jú eisini galdandi fyri fleiri aðrar ítróttagreinar, so hóast úrslitini kanska ikki síggjast alt fyri eitt, so eri eg ikki í iva um týdningin, sum høllin kemur at hava í longdini.

Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar Kommunu, hevur saman við Hallarstuðlanevndini, arkitekti og verkfrøðingum verið og hugt at økinum, har høllin skal gerast, og eisini hann fegnast um, at høllin nú verður veruleiki.

– Ikki minst hevur tað stóran týdning, at ídnar lokalar kreftir standa aftanfyri hetta projektið. Tá eru eisini størri sannlíkindi fyri, at høllin verður ein høll, sum er ætlað til júst teirra tørv. Bæði innan ítrótt, mentan og onnur viðurskifti á staðnum, sigur Heðin Mortensen.

– Kollfirðingar hava leingi bíðað eftir hesari høllini, og tó at hon fyrst og fremst er ætlað til ítrótt, so ivist eg ikki í, at hon kemur at vera eitt slag av miðdepli í bygdini. Ein savningardepil hjá bæði ungum og gomlum, sum her koma at fáa karmar um aktivitetir av ymsum slag.

Ætlandi verður arbeiðið skipað soleiðis, at tað verður Hallarstuðlanevndin, sum stendur fyri bygginini, sum so verður stuðlað av Tórshavnar Kommunu og Mentamálastýrinum. Samlaði kostnaðurin av arbeiðinum er mettur til 13.43o tkr., og verður kostnaðurin millum partarnar býttur soleiðis:

Eginfígging, Hallarstuðla 500.000
Tórshavnar Kommuna 9.697.500
Mentamálastýrið 3.232.500

## Todi skal binda frið

Líkt er nú til, at Todi Jónsson longu nú kann fara at hugsa um jólagávur, dunnuna til døgurðan og annað, sum hoyrir jólunum til.

Í øllum førum hevur hann fingið boð frá FCK um, at tað ivaleyst er best, um hann fullkomuliga bindur frið í øllum førum tað komandi vikuna.

Orsøkin er skaðin í lærkrikanum, sum hevur argað føroyska álopsleikaran í longri tíð. Fyri stuttum varð loksins staðfest, hvør orsøkin til skaðan var, men hóast hetta nú er staðfest, so merkri tað ikki, at Todi aftur kann venja við fullari ferð.

– Veruleikin, soleiðis sum hann nú sær út, ger, at eg havi sera ilt við at trýgva, at tað fer at bera til hjá mær at spæla meira í ár. Eftir dystin nú sunnudagin skal FCK niður til Mallorca at spæla seinna dystin í UEFA-Cup kappingini. Eg kann gott siga, at eg eri næstan heilt vísur í, at eg ikki verði førur fyri at fara við liðfeløgunum niður haðar. Tað er spell, men tað er so einki at gera við tað, skrivar Todi um hetta á heimasíðu sínari.

**- jm**

# Hjalgrim í Esbjerg

**Klaksvíkingurin skal hesa vikuna royna seg hjá oddaliðnum í donsku superliguni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Leygardagin fór besti málskjúttin í føroysku fótbóltslandskappingini í ár, Hjalgrím Elttør, til Danmarkar í fóbtóltsørindum.

Hjalgrím hevur sjálvur ongan tíð dult fyri, at dreymurin um eina tilveru sum yrkisleikari er til staðar, og áður hevur hann eisini verið á venjingaruppihaldum í bæði Onglandi og Spania.

Hesa ferð verður tað so hjá aktuella oddaliðnum í donskum superliguni, at Hjalgrím fer at royna seg, og so er spurningurin, hvørt tað eydnast honum at sannføra teir har í felagnum um evni síni sum málskjútti. Her hevur Esbjerg annars ein av stóru profilunum í donsku superliguni, Tommy Bechmann, men í donskum miðlum hevur oftani verið gitt um, at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn Esbjerg ikki longur hevur ráð at siga nei-takk, tá onnur feløg í bæði Danmark og aðra staðni vilja keypa vandamikla álopsmannin. Tí er einki at ivast í, at tey í felagnum eisini hugsa um, hvørjir møguligu avloysararnir kunnu vera.



*Hjalgrím Elttør vann gylta skógvin fyri mál síni í ár. Nú er hann í Danmark, har hann skal sannføra leiðsluna í Esbjerg um evni síni at finna meskarnar*



**Hyundai Sonata 2.0 bensin**



prísur 177.500,-

- Myrkagráur
- Árgang 2002
- Km. 32.000
- El-rútar
- Klimaanlegg v.m.
- Hita í setrunum
- Sera vælhildin

Sosialurin 341800

**Rexton RX290 4x4 nýggjur**

Mercedes motorur
2.9 litur
aircondition
el-rútar v.m.



Vørubilur, prísir úr 238.648,- v/mvg
Persónbilur, prísir úr 311.190,- v/mvg

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**

Starv sum lærari er leyst til setan 1. januar 2004 ella eftir avtalu.

**Høvuðsuppgávurnar hjá læraranum fevna um:**
- Undirvísing í sjúkrarøkt, vísindaástøði og háttalagsfrøði
- Vegleiðing í samband við uppgávuskriving og verkætlanir
- Saman við undirvísarunum á skúlanum leggja frálæruna tilrættis

**Førleikakrøv:**
- Sjúkrarøktarfrøðingur við viðkomandi framhaldslestri á kandidat ella masterstøði
- Kunnleika til útbúgvingina til sjúkrarøktarførðing og royndir innan undirvísing

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya tekur 20 lesandi inn um árið.

Á skúlanum verður støðugt arbeitt við at menna útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing. Í sambandi við at útbúgvingin verður umløgd, henda stórar broytingar á skúlanum. Sum lærari á skúlanum født tú møguleika at luttaka í og ávirka broytingarnar.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til rektaran tlf. 316027 lokal 436 ella tel. 315950.

Umsókn við CV og prógvum skal sendast til:

**Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya**
att.: Rektaran
Eirargarður 14 B
FO-100 Tórshavn

Umsóknin skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 8. desember 2004.




- men álvaratos, var tað hetta, tú ætlaði tær, Álvur?

At seta búgv er ikki bara sum at siga tað. Sjálvt eini smá hús kunnu kosta nógvan pening og í flestu førum merkir hetta, at tú bindur teg í mong ár.

Hví ikki byrja at spara saman nú? Byrjar tú í góðari tíð, kanst tú sleppa undan at taka stór lán, og tú fært betri ráð at vera í húsunum.

** Tú skalt vera fylt/ur 16 ár, um tú skalt stovna bústaðarkonto.*

Við Bústaðarkonto hevur tú møguleika at spara 240.000 kr. upp yvir 8 ár. Harumframt fært tú høga innlánsrentu frá bankanum, umframt 3% í rentustudningi frá landskassanum. Tað ger mun!

Les meira um Bústaðarkonto á www.foroyabanki.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við starvsfólk bankans.

Vit geva tær betri ráð.

FØROYA BANKI

Skálabúðin




**KOM Á JÓLASØLU HJÁ ALV**

Jólasølan verður
mikudagin 26. og
hósdagin 27 nov.
kl. 13.00-20.00

Møguleiki verður at
keypa sær kaffi
og okkurt gott afturvið.



Sjálvsognarstovnurin ALV
Smiðjugerði 6, kj.
100 Tórshavn
Tlf.: 35 00 70

Sosialurin -har tað hendir